# Vága kommuna
## FUNDARBÓK 2013
**8**/11-03-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur** **nr. 3.**<br>Tíð: **30. januar kl. 18$^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Johannes Klein, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Johannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:**<br>Egil Petersen. |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2012-00-00249<br>Støðutakan til, um kommunan skal tekna limaskap í Kommunusamskipan Føroya.<br>F.N. mælir til at tekna limaskap í KSF. | Samtykt at tekna limaskap í KSF. |
| Mál nr. 2013-00-00005<br>Fyrsta viðgerð av uppskoti um broytingar í kommunustýris-skipanini fyri Vága kommunu. Broytingarnar hava við sær:<br>• Regulering av borgarstjóralønini.<br>• Broyting í §25, stk. 2.<br>• Broyting í §27.<br>F.N. mælir til at broyta kommunustýrisskipanina sambært fyriliggjandi uppskoti. | Samtykt.<br>Marin viðmerkir, at hon av prinsippiellum orsøkum er ímóti, at borgarstjóralønin verður lækkað. |
| Mál nr. 2013-47-00037<br>Stein Fossá frá Umhvørvisstovuni kunnar kommununa um, at fotoflúgving ætlandi verður í ár. Hann spyr, um myndir skulu takast í Vága kommunu. Mettur kostnaður verður um kr. 25.000,-. | Samtykt. Peningurin verður tikin av § 6 Teknisk mál, konto 1479 RS:62610 (vegir). |

Fundurin lokin kl.18$^{30}$.